## Sjey avhopparar

Sjey fólk eru flýdd úr Norðurkorea til grannalandið Suðurkorea. Sambært teimum suðurkoreonsku myndugleikunum flýddu tey eftir sjónum, og júst tað verður hildið vera sera hættisligt, tí norðurkoreanar halda eitt vakið eyga við havleiðunum millum londini. Reuters skrivar, at tey sjey komu í land í gjár, og at tey alt fyri eitt fóru til avhoyringar hjá fregnartænastuni. Júst nú er vandi fyri øktum spenningi millum koreonsku londini londini, tí stýrið í Norðurkorea hóttir við at fara undir eina herflotavenjing úti fyri vesturstrondini, skrivar Reuters.



## Obama í jólahýri

Tann seinasta tíðin hevur verið strævin hjá amerikanska forsetanum, Barack Obama, sum hevur havt úr at gera í sambandi við veðurlagsráðstevnuna og uppskotið um nýskipan innan amerikanska heilsuøkið. Tí mundi tað kennast sum ein lætti, tá hann í nátt setti seg at lesa jólasøgur í einum klubba í Washington. Áhoyrararnir, sum vóru millum seks og ellivu ára gamlir, fingu eisini smákøkur frá forsetanum, sum eisini royndi at fregnast eftir, hvat børnini ynsktu sær í jólagávu. At enda sluppu børnini á eina mynd saman við forsetanum.



*Nú er greitt, at tað verður heldur ikki næsta ár, at illa umstríddi Leirvíksvegurin verður gjørdur*

# Leirvíkingar illa við

**Tað kom dátt við hjá leirvíkingum a frætta, at heldur ikki næsta ár er eitt klovið oyra sett av til illa umstrídda vegin ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin var, at fimm milliónir skuldi setast av til vegin, men tá ið fíggjarlógin hevði verið ígjøgnum mylluna hjá fíggjarnevndini, vórðu eisini tær strikaðar, so nú er ikki eitt oyra til vegin.

Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu, er alt annað enn fegin um úrslitið, men hann vil onki siga, fyrrenn býráðið hevur havt høvi at viðgera spurningin.

Fríðgerð Heinesen er varaborgarstjóri og hon var eisini borgarstjóri í teirri gomlu Leirvíkar Kommunu, sum síðani er løgd saman við Gøtu undir heitinum Eysturkommunan.

Heldur ikki hon vil siga so nógv, fyrrenn býráðið hevur viðgjørt málið.

Men hon sigur, at leirvíkingar eru so illa viðfarnir av landsins myndugleikum í so nógv ár, at í grundini er hon ikki kløkk av at frætta, at tað verður heldur ongin vegur næsta ár.

Onkuntíð hava leirvíkingar verið so leiddir og keddir, at teir hava róð framundir at siga sáttmálan upp við tunnilsfelagið, sum loyvir teimum a binda tunnilsvegin í tann kommunala vegin. Tað skuldi so ført við sær, at tunnilsvegurin ikki kundi vera bundin í kommunala vegin longur.

Tað vil hon onki siga um enn, men hon staðfestir, at íbindingarloyvið gekk út á nýgjárinum, so hetta seinasta árið hevur onki loyvi verið.

Men hon heldur kortini, at hetta kann vera ein góður lærupengi hjá øðrum kommunum um ikki at geva landinum nakrar sum helst sømdir, fyrrenn púra greiðar og bindandi avtalur fyriliggja.

Hon sigur, at tað hevur elvt til stórar trupulleikar, at vegurin ikki verður gjørdur, tí leirvíkingar liggja við eini nýggjari bygdaætlan, sum ikki kann samtykkjast og tað hevur forða kommununi í at gera grundstykki til sethús og vinnubygningar.

# Smyril hevur ikki sett ferðina niður

**Strandferðslan avsannar upplýsingar frá løgtingsformannnum um, at Smyril hevur sett ferðina niður fyri at spara olju**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Strandfarskipið, Smyril, hevur sett ferðina niður fyri at spara olju.

Hetta staðfesti Hergeir Nielsen, løgtingsformaður og sjálvandi eisini løgtingsmaður, á tingsins røðarapalli fríggjadagin.

Sum ikki einaferð, vóru løgtingslimir endaðir í einum drúgvum orðaskifti um Strandferðsluna, túratal, skip og ferðaætlanir.

Undir tí orðaskiftinum førdi Hergeir Nielsen fram, at nú hann var komin úr Suðuroy til Havnar, hevði túrurin vart tveir tímar og eitt korter.

Tað tók hann sum prógv fyri, at Smyril hevur sett ferðina niður fyri at spara olju.

Men hetta avsannar Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni púra avgjørdur.

Hann sigur, at tað er rætt, at Smyril hevur siglt nakað spakuligari í tveir dagar, men at tað hevur sínar natúrligu forkláring.

- Týsdagin varð ein motorur steðgaður, tí eitt filtur til brennievni skuldi skiftast. Av tí sama hevur Smyril siglt við trimum motorum í týsdagin og mikudagin og tað ávirkaði sjálvandi ferðina.

Men hósdagin varð motorurin startaður aftur og tá sigldi Smyril aftur við vanligari ferð.

Og Conrad Gaard Joensen sigur, at vanlig ferð er, tá ið Smyril hevur ein tíma og 55 minuttir um túrin ímillum Krambatanga á Trongisvágsfirði og Havnina og tað roynir skiparin at halda seg til.




*Smyril hevur siglt spakuligari í tveir dagar, men tað hevur sína natúrligu forkláring, sigur Strandferðslan*

# Um 10 dagar fara sjúkrakassarnir í søguna

**Seinnapartin fríggjadagin samtykti Løgtingið lógina um tað almennu heilsutrygdina. Heilsutrygdin kemur í gildi á nýggjárinum og tað merkir, at nýggjársaftan fara teir gomlu sjúkrakassarnir í søguna**

HEILSUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Øll skulu nú rinda sama gjald, 245 krónur um mánaðin, í almennu heilsutrygdina og tað verður TAKS sum skal standa fyri innkrevjingini.

Tann 1. apríl 2010 kemur eisini ein nýggj tilskotsskipan til heilivág gildi. Tilskotið til heilivág verður roknað eftir einum nýggjum samhaldsføstum leisti, har tey, sum brúka mest pengar til heilivág fáa mest endurgoldið frá Heilsutrygd, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Tað er eisini mark fyri, hvussu nógv borgarar sjálvir skulu gjalda fyri heilivág. Ung undir 18 ár og eldri yvir 67 ár koma sambært nýggju lógini ongantíð at gjalda meira enn 1.195 krónur um árið fyri heilivág. Hjá teimum í aldrinum 18 til 67 ár er hámarkið 1.600 krónur um árið.

Grundreglan er, at tað ikki eigur at verða ein fíggjarligur smeitur fyri tey, ið vegna sjúku hava tørv á nógvum ella kostnaðarmiklum heilivági, sigur landsstýrismaðurin.

### Bíligari kostískoyti

Somuleiðis skal Heilsutrygd veita stuðul til kostískoyti, merkivørur og annað.

Hjá nógvum rakti tað meint, tá ið almenni stuðulin til hetta varð tikin burtur í summar. Men nú skal ein nevnd gera ein lista yvir merkivørur og annað, sum skul fáa tilskot frá Heilsutrygd.

– Dømi um kostískoyti og merkivørur, sum kunnu væntast at fáa stuðul eru lactulosa, kolkískoyti, ymisk krem til húðrøkt o.s.fr.

Tann 1. januar 2011 fáa allir føroyingar eisini eitt nýtt altjóða heilsutrygdarprógv og heilsutrygd verður partur av Talgildu Heilsuskipanini.

Og seinasta stigið verður tikið tann 1. januar 2012, tá ið gjaldið til Heilsutrygdina verður tikið av so at hon verður fíggjað umvegis vanliga skattin.